Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 3. mars 2006

80 ÁRA DANSUR
Rimmar 80 ára dansur við Hjarnum, Black Birds og Sámal & Ronnie verður í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið 4. mars.
Frásøgumaður verður Jákup Magnussen.
STUÐLAFELAGIÐ HJÁ ARGJA BÓLTFELAG






**Oscar 2006**

DR2

SvF samsendir við Dr2 frá Oscar-handanini, størsti filmsfagnaðurin á árinum. Og sent verður til tann ljósa morgun, tá ið hæddarpunktið verður rokkið og m.a. best filmur verður kunngjørdur. Tilnevndir filmar eru "Capote", "Good Night, and Good Luck" og "Syriana". Verturin í ár er John Stewart, ið er kendur frá undirhaldssendingini The Daily Show, ið gongur á Canal+-rásini. Tað besta av Oscar-handanini verður sent mánakvøldið á SvF.

**Sunnudag 5. kl. 21.50**



**Ferðir til heimsins enda: Sudan**

DR2

Sudan er største landið í Afrika. Ein rættilig skattakista við ráevnum sum gull, uran og olju í, sum eingin enn hevur gravað eftir. Orsøkin er syrgilig. Tey flestu av íbúgvum landsins, ið telja 33 milliónir, liva uttan elektrisitet, telefon ella posttænastur. Her hevur eitt av longstu borgarakríggjunum í heiminum herja. Tó, einaferð var tað ikki so. Veldiga kongaríkið Kush ráddi yvir Egyptalandið. David Adams fer suðureftir Nil-ánni. Hesa vikuni fer David eisini til Afghanistan og Shangri-la í Himalaya.

**Mikudag 8. kl. 18.10**



**Krúnprinsessan 1:4**

svf

Charlotte Ekeblad er mitt í 30 árunum, gift við Thomas og mamma at tveimum børnum. Hon hevur pakkað kuffertini fyri at fara við manninum til Uganda, har hann skal arbeiða. Men eitt kvøldið ringir telefonin. Tað er statsministarin, sum gevur henni eitt tilboð, hon ikki kann siga nei til: Charlotte skal verða umhvørvismálaráðharri í hansara nýggju stjórn og fáa futt í umhvørvismálaráðið. Men innast inni har valdið er, noyðist Charlotte at sanna, at tað er ikki alt gull, sum glitrar. Svensk røð eftir bók hjá Hanne Vibeke Holst

**Sunnudag 5. kl. 20.40**

TV Televarpið
Fleiri rásir - einki roks
Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið